Samgongan hevur latið tolllættar

Javnaðarflokkurin hevur tað ikki við at læsa seg fastan í farna tíð. Javnaðarflokkurin torir at líta inn í framtíðina. Tað er hóast alt henni, vit skulu liva í. Tað gamla er farið, tí alt er vorðið nýtt, skrivar Edvard í Skorðini Joensen m.a. í eini viðmerking.

Einhvør skilagóður knokkur innan Fólkaflokkin hevur funnið út av, at nú skal valagitatiónin hjá flokkinum ganga upp á at siga okkum, at sitandi samgongan hevur dikt fólk undir í tolli og avgjøldum, og at Fólkaflokkurin er fyri at taka hesi av aftur.

Tað er rætt, at ávís avgjøld vórðu áløgd av samgonguni. Men hetta var so sanniliga neyðugt fyri at rættað upp aftur nakað av tí, undanfarna stýrið legði eftir seg.

Men kortini kundi henda samgongan lata fólki tolllættar. Og ikki smávegis heldur. Eg skal her nevna nakrar:

Dekk og slangur til akfør	lækkað við	25%
eykalutir til bilar	lækkað við	23%
musikinstrument	lækkað við	15%
hátalarar og forsterkarar	lækkað við	35%
matvørur (allur konservestollur)	lækkað við	30%
lutir úr gulli, silvuri og platini	lækkað við	10%
lutir úr tini	lækkað við	40%
lutir úr rustfríum stáli	lækkað við	25%
skreytvørur úr aðalmet. og plettaðar.	lækkað við	100%

Fyri at ikki misskiljing skal vera, eigur at sigast, at hetta er punkttollurin, men at innflutningsgjaldið tó enn er galdandi. Men eisini her eru framdir ávísir batar, sum víst er á viðlagda avriti. Stk. 19, sum er um byggitilfar, er eitt dømi um tolllætta samgongunnar. Og júst hetta, at avtaka tollin á byggitilfari, er tað, Fólkaflokkurin bjóðar fram sum alternativ til sitandi samgongu. Hetta avgreiddi løgtingið í summar, og kom lógin í gildi 1. juni 1988. So har er lítið eftir hjá Fólkaflokkinum at bjóða.


Fríggjakvøldið var eitt orðaskifti í sjónvarpinum, har Sundstein & Ellefsen endiliga søgdu okkum, hvat alternativið til sitandi samgongu er. Tað er Javnaðarflokkurin. Ellefsen segði, at tnn, sum ikki velur Sambandsflokkin, styðjar Javnaðarflokkin. Og Sundstein í sínum lagi, at tann, sum ikki velur Fólkaflokkin, hjálpir Javnaðarflokkinum. So ikki kann valið vera torført. Tí hvørgin av áðurnevndu hevur nakað sum helst at bjóða fólki. Har er tann bera neyð og elendigheit.

Jógvan Sundstein var so misnøgdur við, at Atli Dam bert tosaði um framtíðina. Tað skilja vit so væl. Fólkaflokkurin hevur ongantíð havt nakað at borið fram um, hvat teir ætla at gera eftir eitt val. Júst hetta er, sum áður sagt fleiri ferðir, munurin á Javnaðarflokkinum og øðrum. Javnaðarflokkurin hevur tað ikki við at læsa seg fastan í farna tíð. Javnaðarflokkurin torir at líta inn í framtíðina. Tað er hóast alt henni vit skulu liva í. Tað gamla er farið, tí alt er vorðið nýtt.

Og Pauli Ellefsen var sær sjálvum líkur. Hevði Sambandsflokkurin havt rátt, hevði staðið nógv betur til. Spardar høvdu verið 1,5—2 milliardir. Men hvar tær skuldu verið spardar, var sjálvandi einki boð uppá. Jú, forrestin. Dúgvan skuldi ikki verið keypt, men eitt nógv betur skip. Ikki eiti á sparing.

Áralangar royndir hava víst, at rættast er at standa saman um Javnaðarflokkin. Hann vil, og hann kann. Hann er besta trygdin fyri einum liviligum samfelag. Tí fylkjast vit um Javnaðarflokkin, sum fer at leiða Føroyar inn í ár 2,000.

Edvard í Skorðini Joensen



LØGTINGSLOG

nr.9 frá 27.april 1961 við seinni broytingum um

serligt innflutningsgjald

§ 1.

Av allum vørum undantikið tær í § 2 nevndu,sum innfluttar verða skal fíndast eitt gjald uppá 22% av virðinum.

§ 2.

Undantiknar frá innflutningsgjaldinum eru hesar vørur:

1) Korn, hveiti, bygg, havragrýn, súkur, groft salt, fóðurevni, kol, koks, cinders, petroleum, benzin, brennioljа, smyrjuolja, gass, skip og bátar 5 brt.reg.tons og størri, (tó ikki lystskip), flogfør og tyrlur, tannustavar, gavupakkar, medicinvørur, prent-appir, løkur og blað (tó ikki prentlutir av sálufremjandi slag).

Undantikin frá innflutningsgjaldinum eftir hesi lógini eru eisini:

3) Togverk, wirur og tilfar til.

2) Fiskilinur, fiskinæríir, teymar, gørn, notir og tilfar til.

3) Hukar, flot, fiskilodd, sekk o.t.

4) Trol og tilfar til, lemmar, bobbens, sjeklar, trolhuðir o.t.

5) Flat og tilfar til pakkingar av fiski og sild sum t.d. kassar til fisk, konservesdósir, lysitunnur, sildatunnur, gjarðir o.t., dósir til fiak, rogn o.t., hessian í longdum og posum, seglduksar, seglgarn, bond, plombur, oceanpappir o.t.

6) Agn.

7) Gummílivbátar.

8) Maskinur til fiskiídnað og fiskaaling:

a) Vektir og vektskipanir.

b) Aðrar maskinur.

9) Fiskakassar og -kør, filetbakkar.

10) Fiskur, ið avreiddur verður frá fremmandum skipum, fiskur sum innfluttur verður til virkingar ella fiskur, ið er keyptur og innfluttur á føroyskum skipum.

11) strikað.

12) Maskinur til handverk og iðnað av ti partinum, sum er yvir 50.000 kr.

23

13) Maskinur til landbunaðin av ti partinum,sum er yvir 50.000 kr.

14) Handilstæð.

15) Siglingar-, leitingar- og kommunikationsútgerð, skips- og bátamotorar, ljósmotorar, egningarmaskinur, skrúvudýsur, kraftblokkar, troispæl, snurpispæl og onnur skipsspæl.

16) Er strikað.

17) Hyru- og skulavognar.

18) Til fiska- og skeljaaling:

a) Serutgjørdir alibatar undir 5 BRT.
b) Aliringar og alibur.
c) Flotbrýr.
d) Klekiútgerð (bakkar, rennur).

19) Veiskt byggitilfar:

Cement, útiligjørt timbur, krossfiner, byggiplátur, gipsplátur, sansnitplátur, laminatplátur, stein- og glasiullarmatta og glastrevja, plastraverar, taksteinur, tjerupapp,tak- og klædningsplátur, planglas í talvum, útiligjørt jarn og stál (plátur, bjalkar og profilir), útiligjørt aluminium (plátur, bjalkar og profilir, rátt grót og marmor, eisini knust, sandur og grus,iecca og pimpsteinur, Silicium, Stalsáttur (úr 9 - 14 % um kamstáli), sokallað rio-net. Papprør til framleiðslu av betongelementum.

20) Brilluglas,ikki isett, og kontaktlinsur úr glasi ella øðrum tilfari.

21) Bjargingarveltir og -vestar, Neyðransonir og onnur lógarkravd útgerð til bjargingarbátar og -flakar.

Somuleiðis eru tær í §§ 2 og 3 í løgtingslog nr.23 frá 11.februar 1950 við seinni broytingum nevndu vørur avvikavist undantiknar ella kunnu undantakast innflutningsgjaldinum.

§ 3.

Innflutningsgjaldið verður roknað av gjaldskylduga virðinum.


Gjaldskylduga virðið verður ásett eftir reglum, fyrisett av landsstýrinum í samsvar við ásetingunum í avtalu um nýtslu av artikul VII í Almenna sáttmálanum um tollskrár og samhandil (GATT).

Hesin kostnaður skal leggjast aftrat fakturaprisinum, um hann ikki longu er umfataður:

- kostnaður keyparans til provision og innbalding,
- royalty ella licensavgjald,sum keyparin er skyldugur at gjalda,
- partur av søluvinningi av innfluttu vøruni, sum seljarin hevur til henda eftir avtalu.

Ábyrgd ella hamskifti!!

Fyri nøkrum fáum døgum síðan kom ein fólkafloksmaður til mín og segði, at vit í Javnaðarflokkinum vóru í ti hepnu støðu, at vit høvdu ein formann, sum nærum hvør einasti veljari í Føroyum hevði virðing fyri, og hevði álit á. Viðari segði hann, at hetta álit og henda virðing ikki bert var galdandi fyri tey, ið vóru javnaðarfólk, men at hetta er galdandi í vanligari fólkaflokshugsan, og hugsan tjóðveldismanna. Samstundis segði hann, at Sambandsflokkurin hevði sum so ongan týdning í føroyskum politikki, og at hesin flokkur uppá forhond var dømdur til tap. Her er og verður bert tað gamla »sjabbið«: *Vit kunna og duga einki sjálv.*



Sigfriður Olsen

Sjálvandi kundi eg ikki annað, enn geva hesum fólkafloksmanni rætt!!!

Vit, sum kenna Atla Dam, vita, at tá hann sigur: at eitt orð er eitt orð, og ein maður ein maður — so er eitt orð eitt orð, og ein maður ein maður. Øll eiga til hetta fólkatingsvalið at gera sær greitt: *At Javnaðarflokkurin sigur ikki eitt í dag, og ger nakað annað í morgin!!!*

Tann flokkur, ið hevur verið mest ágrýtin at loypa á Javnaðarflokkin, er tann Føroyski Fólkaflokkurin (Radikalt sjálvstýri).

Tí gjørdist eg sera bilsin, tá eg sá í Dagblaðnum og hoyrdi í Útvarpi Føroya, at háttvirdi løgtingsmaðurin Svend Åge Ellefsen, valevni hjá tí Føroyska Fólkaflokkinum í Vága valdømi, koma fram, og í skrift og talu fer at lovprisa tiðarskeiðnum frá 1974 og frameftir. Hann vísir á tann stóra framburð, sum tá hendi í føroyskum politikki.

Eg eri púra samdur við Svend Åga. Serliga vóru tað árini frá 1974 til 1980, sum stórhendingar fóru fram.

Hesi ár tóku Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum hevði leiðsluna í hendi, megnarstig saman; megnarstig, sum gagnaðu føroyska samfelagnum í stóran mun!

Hesi árini var Sambandsflokkurin við Paula Ellefsen á odda í andstøðu, og tað stendur *»krystallklárt«*, at Pauli dugdi at misnýta ta ónøgd, sum altið er í einum demokratiskum samfelag, til fyrimuns fyri seg sjálvan og Sambandsflokkin.

Hann dugdi enntá so væl, at hann til løgtingsvalið 1978 fekk lumpað núverandi løgtingsumboð Fólkafloksins fyri Vágoynna at vera stillara hjá Sambandsflokkinum!!!

Citat úr grein hjá Åga í Dagblaðnum 31. okt.:

lagi.

Og føroyingar gloyma ikki so skjótt, sum sambandsmenn vildu ynskt.

Allir tilkomnir føroyingar minnast, í hvussu

Vít onnur standa bert spyrjandi: Hvat er endamálið við hesum sjónleiki???

Men støða okkara er greið: Vit taka fult undir við Atla Dam: Eitt orð er eitt orð, og ein maður er ein maður.

Tí fara vit á val og velja ábyrgdarflokkin, lista C.